


# Valblað í Sosialinum valdagin

Í týsdags-Sosialinum – blaðnum, sum kemur á gøtuna mánadagin seinnapartin, fara vit at prenta eitt serligt valblað sum innlegg í Sosialinum. Hetta gera vit, tí okkum tørvar pláss til alt valtilfarið og, tí hetta eisini gevur okkum møguleikan at hava tilsamans 32 síður í litum hendan dagin.

Vit bjóða hervið flokkum og valevnum greina- og lýsingarpláss í hesum blað, sum eisini fer at hýsa øðrum tilfari, so sum redaktionellum tilfari, Tinghelluni, har samfelagsfrøðingar o. o. hugleiða um valið, eins og vit eisini prenta valtalvuna, so fólk kunnu fylgja við, tá Útvarpið og Sjónvarpið koma við valúrslitinum valkvøldið.

- Evstamark at fáa lýsingar í hetta blað er fríggjadagin 16. januar kl. 16:00
- Pláss er fyri litlýsingum á 16 síðum og sv/hv lýsingum í upp til 40 síðum
- Evstamark fyri valgreinum er sunnudagin 18. januar kl 14:00
- Valgreinar skulu sendast sum teldupostur til post@sosialurin.fo, og tær skulu verða rættlisnar
- Prísir á lýsingum og valtilfari eru teir somu, sum í vanliga Sosialinum

Ringið og bíleggið pláss á 341 800 og biðið um Lýsingardeildina. Hittast eisini á 223 369 og 229 044




HESTPRENT · TEL. 314 555



**VALGREINAR**

# Viðmerking til Jógvan á Lakjuni

**Dan R. Petersen**
*valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Fyrst má eg siga, at Gullbrandur Olsen óiva var tann skilabesti í sendingini um alingina hóskvøldið, og eg havi varðhugan av, at hann eisini politiskt er skilamaður. Síðan eru vit ikki samdir meir.

Tað tykir mær løgið, at samgongumaðurin Jógvan skuldsetur javnaðarflokkin í andstøðu fyri ikki at hjálpa alivinnuni. Jú, javnaðarflokkurin hevur fleiri uppskot um loysnir, tá vit nú koma til aftur: Lækka tyngjandi avgjøld. Loyva fremmandum kapitali inn. Takað upp samráðingar við ES um útflutning av ILA-vaccineraðum laksi. Loyva Framtaksgrunninum at keypa seg inn í alingina. Og til seinast, men ikki minst at stovnseta ein kreppugrunn, sum kann lofta vinnuni, tá hóttafall er.

Eg tók tað sum eitt erkennilsi, tá Tobbi segði, at virkin vinnulívspolitikkur ikki var rikin tey seinastu árini. Slíkt er jú ræðandi.

Viðvíkjandi Føroya Fiskaaling so er játtanin so lítil, at tær royndir, sum verða gjørdar við toski og kalva, eru við at detta niður fyri. Kalvin missir pigmenteringina, tí tey ikki hava fíggjarorku at gjøgnumføra verkætlanina. Og ljósareyður ella hvítur kalvi er ikki serliga delikatur. Bjarni Djurholm úr fólkaflokkinum umsitur vinnumál og sostatt Føroya Fiskaaling og er tí ansvarligur.

Annars síggi eg fram til at loysa trupuleikarnar í alivinnuni saman við Jógvani í einum nýggjum løgtingið.

# Fleiri arbeiðspláss í Suðuroy er ein treyt fyri, at fáa ungdómin aftur

**Finnleif Guttesen**
*Valevni Sambandsfloksins Suðuroy*



Vit mugu standa saman og virka í felag, óansæð politikk, bygdaklandur og uppruna.

Skal okkara besta tilfangi, ungdómurin, hava nakran møguleika fyri at koma aftur til oynna, skulu nógv nýggj arbeiðspláss setast á stovn.

Her skal hugsast nýtt og hugburðir mugu broytast til gagns fyri Suðuroy, so at okkara ungdómur hevur hug til at koma aftur.

Hetta kann gerast við at flyta almennar stovnar og størv úr miðstaðarøkinum. Land og kommunur mugu stuðla ígongdsetarum og betra karmarnar hjá privata vinnulívinum.

# Fólkaheilsan og fyribyrging av misbrúki eru hjartamál hjá mær

**Carl August Arge**
*valevni Sjálvsstýrisfloksins í Suðurstreymi*



*Fyribyrgingarpolitikkurin skal styrkjast munandi. Ungdómurin skal verjast betur fyri skaðiligum árini av misbrúki. Misbrúksviðgerðin skal endurskoðast og betrast.*

Øll kenna vit onkran alkoholikara ella misbrúkara av øðrum slag, t.d. rúsevnismisnýtara ella medisinmisnýtara. Nógv hava onkran í familjuni, í nærmastu slekt ella arbeiðsfelaga.

Kanningar í hinum Norðurlondunum benda á at heili 10% av vaksna fólkinum hava henda ræðuliga trupulleika.

Veruliga talið á teimum sum líða illa av misbrúkinum er tó væl hægri. Misbrúkarar hava nevniliga avvarðandi, børn og arbeiðsfelagar,- teirra líðing er ofta líka tung sum hjá misbrúkaranum sjálvum.

Ikki er ov nógv sagt at misbrúk er ein tann største heilsutrupuleikin vit hava í samfelagnum. Hann kostar ómetaliga nógv - bæði menniskjansliga og fíggjarligt.

Trupuleikin finst í øllum samfelagsbólkum. Hann er sanniligi ikki bert at finna á Herberginum. Hann er eisini væl umboðaður í Tinginum! Eg meti sjálvur at misnýtslan millum fleiri leiðandi landstýrismenn í áttatiárunum var ein stór medvirkandi orsøk til djúpu kreppuna.

Vit hava í dag 2 viðgerðarheim sum tilsamans fáa uml. 10 mill. kr. árliga, beinleiðis frá fíggjarlógini. Eingin annar fær eitt oyra.

Viðgerðarheimini veita, í tí eina førinum onga og í hinum førinum, sera avmarkaða hjálp til tey avvarðandi.

Ongin eftirmeting er gjørd av viðgerðarúrslitunum síðani heimini blivu stovnaði miðskeiðis í áttati árunum.

Nógv fólk meta at viðgerðarheimini hava sera vánalig úrslit. Tosað verður um "Tordensskjolds soldater" ella "svinghurðsmodellið"

Eg veit væl at nógvar sólsskinssøgur eru.

Eg eri sjálvur ein teirra. Eg eri alkoholikari, men fekk hjálp í Føroyum og Íslandi fyri smáum 17 árum síðani. Eg havi verið heilt rúsfríur nú í 15 ár. Hetta er heilt einfalt tað besta sum er hent mær og mínari familju. Og eg skyldi samfelagnum eina stóra tøkk fyri hjálpina.

Men eg veit tíverri eisini um sera, sera nógv, sum ikki hava eydnast at fáa nakra broyting hóast tey hava verið fleiri ferðir í viðgerð. Og teirra avvarðandi fáa sum nevnt at kalla onga hjálp.

Tey positivu viðgerðarúrslitini eru neyvan meira enn 10%.

Nógv børn og ung eru misbrúkarar ella eru í vanda fyri tí. Alt ov lítið verður gjørt fyri at fyribyrgja hesum.

Vit hava eitt Fyribyrgingarráð við einum hálvtíðarsettum skrivara. Ráðið hevur sera breiðan arbeiðssetning. Alkohol, rúsevni, tubbakk, AIDS, kostvanar, fýrverk og mang annað skal hetta undirmannaða ráð taka sær av.

Her má broyting koma í!
Eg skjóti upp:

- Ein óheft eftirmeting av úrslitunum, síðani byrjan, hjá viðgerðarheimunum skal gerast.
- Greið mál verða sett upp fyri hvat mann vil náa við misbrúkstiltøkunum og regluliga skal metast um viðgerðarheimini røkka málunum.
- Peningur skal ikki játtast í einum klumpi til viðgerðarheimini. Hetta er í dag ein stór sovipúta hjá verandi privatu viðgerðarheimum. Peningurin skal fylgja klientinum og fleiri viðgerðarar skulu sleppa frammat. Hetta gevur kapping og tryggjar nógv betri úrslit.
- Fyribyrgingarráðið eigur eisini at fáa greið mál at arbeiða eftir. Og fígging til at røkka uppsettu málunum. Tað sjálvbodna fyribyrgingararbeiði sum verður framt eigur at stuðlast betur.
- Tey sum koma í samband við misnýtarar, serliga læknar, heilsurøktarfrøðingar og heilsusystrar, men eisini skúlafólk, løgreglufólk, sosialráðgevar o.o., skulu fáa ein væl betri førleika í at kenna aftur tekini uppá misbrúk í byrjunarstigunum og í at hjálpa hesum fólkum.
- Vit hava 18 ára aldursmark fyri rúsdrekkakeyp. Men ung undir 18 drekka sera nógv - og stórt sæð blunda øll fyri hesum. Tað skal vera eitt krav at vísa samleikaprógv tá rúsdrekka verður keypt. Vit skulu reagera álvarsliga tá ung undir 18 ár rúsa seg.
- Reglugerðirnar fyri skoynkingarstøðini skulu yvirhaldast. Tað er forboði teimum at skeinkja til rúsaði fólk, men reglan verður als ikki hildin. Far inn á eitt vertshús eitt fríggjakvøld - ella hví ikki sunnudag seinrapart - og hygg, um tú ikki trýrt mær. Dýrandi full fólk hava ongan trupuleika at fáa meira rúsdrekka. Vertshúsini eiga at fáa stóra bót og at enda missa skeinkiloyvi um tey ikki halda reglurnar.
- Dansitíðirnar fyri børn og ung eru púra høpisleysar - og eru harafturat brot á galdandi halgidagslóg. Har má broyting koma í.
- 18 ára aldurmark fyri tubbakssølu. Líkaleiðis við kravdum samleikaprógvi og við álvarsligum fylgjum um lógin verður brotin. Tubbakk er sera skaðiligt og sera fá byrja at roykja aftan á 18 ár. Royking er harafturat ein vælkend byrjan til annað misbrúk.

Sjálvstýrisflokkurion hevur, bæði í stevnu- og valskrá, sett sær fyri at styrkja fyribyrgingararbeiði.

Latið okkum hjálpast at at fáa skil á hesum!

Atkvøð fyri Sjálvstýrisflokkinum 20. januar!

Hvør kann? D kann!

# Møguleikarnir eru beint her - og teir bíða ikki eftir okkum!

**Helena Dam á Neystabø**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Øll tosa um betri vinnulívskarmar, men eingin ger nakað við tað. Tað er sum við veðrinum!

Vit vita, at vinnulívið í Føroyum skal hava fleiri bein at standa á, men nú bæði alivinnan og rækjuvinnan hava trupulleikar, sær út til at beinini heldur fækkast.

Tað er ikki tí at eingir møguleikar eru, vit tora bara ikki at lofta teimum. Veruleikin er, at møguleikarnir eru beint framman fyri nøsina á okkum, um vit bert vilja hyggja, lurta og lofta teimum.

**Smátt er gott**

"Vit eru fá og smá". Soleiðis hevur mangan ljóðað í Føroyum. Og rætt er tað, at ringt er at fáa fyrimun av stórdrift í Føroyum.

Men í dag sær heimurin heilt øðrvísi út. Veruleikin er, at stórar fyritøkur, í ramasta álvara hava bankað á dyrnar, og sagt frá, at teir fegin vilja gera íløgur í Føroyum bæði innan tøknifrøði og arvagransking. Men eingin hevur haft dirvi ella áræði til at taka ímóta avbjóðingini. Høvdu vit sagt ja, fingið lógarkarmarnar uppá pláss beinanvegin, vóru Føroyar ivalyst longu í dag komin langt áleiðis at ment nýggjar nútímans vinnur. Og vit høvdu ikki suffað eftir vælútbúnum fólki í heilsuverkinum og innan aðrar granskingargreinar.

Tað sum fyrr var okkara størsti trupulleiki, at vit eru fá og smá, er nú sjálvt tilfeingið. Burturúr hesum tilfeingi ber til at vinna virðismikla vitan, sum kann koma bæði okkum og øðrum til gagns.

Hesar fyritøkur ynskja at koma higar, at gera íløgur her, og at samstarva við okkum á sera høgum stigi, tí teir kunnu blíva klókari. Teir kunnu ivaleyst eisini blíva ríkari, men tað kunnu vit føroyingar eisini. Um vit bert bera okkum rætt at. Soleiðis verður eisini um ein oljuvinna nakrantíð verður veruleiki.

Vit tosa um at umsita okkara náttúrugivna tilfeingi á skilabesta hátt, til frama fyri okkum og fyri komandi ættarlið. Tá verður sum oftast hugsað um fiskin ella um oljuna, sum enn ikki er komin. Her finst eitt tilfeingi, sum allur heimurin tráar eftir at sleppa at gagnnýta, men vit liggja og sova omaná tí. Tað er ikki skilagóð umsiting av virðismiklum tilfeingi.